# Frakland reistist

Fronsku fjølmiðlarnir hava ikki verið blíðir við Les Bleus, aftaná eyðmýkjandi 1-3 ósigurin ímóti Eysturríki á Ernst Happel Leikvøllinum í Wien. Men hesa ferð eydnaðist tað fraklendingum at vinna 2-1 á heimavølli ímóti Serbia, sum hevði ein 2-0 sigur ímóti Føroyum í skjáttini. Støðan í hálvleikinum varð javnleikur 0-0. Tá 54 minuttir vóru spældir, skoraði Thierry Henry til 1-0 aftaná eina góða sending frá Sidney Govou. 10 minuttir seinni økti Nicolas Anelka til 2-0, tá hann setti tveir serbiskar verjuspælarar av, og skeyt eitt skot frá brotsteigarmarkinum, sum sat væl í serbiska netinum. Frakland hevði fleiri málmøguleikar til at økja um leiðsluna, men ístaðin gjørdist tað Serbia, sum minkaði um munin til 1-2 tá Branoslav Ivanovic hegnisliga setti eitt hornaspark frá Bosko Jankovic í netið.



# Skotar vunnu í Reykjavík

Vónirnar hjá íslendingum um eitt gott úrslit ímóti Skotlandi vóru góðar, aftaná, at Ísland varð um reppið at vinna á Noregi í Oslo. Men við einum 2-1 sigri fóru skotar við øllum í Reykjavík. Kirk Broadfoot legði Skotland á odda í 18. minutti, tá hann beindi eitt hornaspark í netið. Tá góður tími varð spældur økti Barry Robson til 2-0 við einum brotsspark. Ímóti dystarenda vaknaðu íslendingar, og tá 77 minuttir vóru farnir fingu íslendingar brotsspark. Stephen McManus hjá Skotlandi fekk reytt kort fyri at steðga bóltin við hondini í skotska brotsteiginum, og brotsspark varð dømt til Ísland. Eiður Guðjohnsen setti brotssparkið í netið til 1-2, og síðstu løtuna trýstu íslendingar fyri aftur at fáa ein 2-2 javnleik, til høldar, men hesaferð eydnaðist tað ikki. Í sama bólki vann Holland á útivølli 2-1 ímóti Makedonia.



*Hóast fleiri av stjørnunum vantaðu, so sýndu rumenar eitt tekniskt avrik í sera høgum flokki. Ikki minst Marius Nicolae, sum Jón Rói tó hevur gott tak á í hesi støðuni*



*Dysturin í og ferðin úr Serbia sat enn í føroysku beinunum, og tí var tað meira reglan enn undantakið, at miðvøllurin bakkaði heilt oman í føroyska brotsteigin fyrstu longu løtuna*

seg tó longur upp. Jákup á Borg gjørdist alt meira vongur enn miðvallarspælari, og tá Andreas Lava Olsen varð skiftur inn, hendi hetta saman við instruksum um, at Christian Høgni Jacobsen nú eisini skuldi flytast niðan í álopspartin.

Og so sást sjónliga, at rumenar høvdu sínar trupulleikar í sálarligu barlastini. Heldur enn at flyta bóltin runt, lótu teir seg stressa, og ávaringarlúðrarnir ýldu alsamt harðari. Mikkjal Thomassen hevði eina góða roynd eftir langt innkast frá Pæturi Dam Jacobsen, og Jákup á Borg var um reppið at fanga veika afturlegging. Størsta kjansin fekk Christian Høgni tó, tá hann og Bogi Løkin í felag trýstu Mihai Nescu til hasarderað afturspæl, men vinkulin var spískur, og tá Christin Høgni royndi at lobba, fór bólturin í krovið á málverjanum.

Rumenar máttu tó halda ondini seinastu løtuna. Føroyingar fluttu nógv fólk fram, hvørja ferð ein deyðbóltur stóð á skránni, og fram til tað seinasta livdi vónin um, at Bartal Eliasen kundi seta pannuna á okkurt av innleggunum.

Heldur ikki hesa ferð gjørdist talan tó um meira enn næstan. Í so máta varð talan um enn eitt av hesum heiðurligu tapunum, sum vit ikki fáa brúkt til so øgiliga nógv. Men við tí vilja, sum varð lagdur fyri dagin í verjupartinum, tykist fyrsta altjóða stigið síðani cyprosferðina í 2005 ikki at vera so langt burturi. Hóskandi kundi hetta komið, tá Eysturríki kemur á vitjan um ein mánað.

## FAKTA um dystin

**Føroyar-Rumania 0-1 (0-0)**
0-1: Razvan Cocis, 59.
HM-undankappingardystur
805 áskoðarar á Tórsvølli
**Føroyar:** 1. Jákup MIKKELSEN, KÍ, liðf.) (59 dystir/0 mál) – 2. Pætur Dam JACOBSEN, Skála (1/0) (14. Bogi LØKIN, NSÍ (3/0), 79.), 15. Egil á BØ, EB/Streymur (3/0), 5. Jón Rói JACOBSEN, Frem (33/0), 3. Jóhan Troest DAVIDSEN, NSÍ (7/0) – 9. Jákup á BORG, B36 (56/2) (13. Bartal ELIASEN, ÍF (5/0), 90.), 4. Atli DANIELSEN, Frem (28/0), 8. Mikkjal THOMASSEN, EB/Streymur (12/0), 10. Christian Høgni JACOBSEN, AB (44/2), 11. Símun SAMUELSEN, Keflavík (20/1) – 12. Andrew av FLØTUM, HB (31/1) (17. Andreas Lava OLSEN, Víkingur (2/0), 76.)
**Gult kort:** Mikkjal Thomassen, 25., Christian Høgni Jacobsen, 57., Jóhan Troest Davidsen, 85.
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 16. René TÓRGARÐ, EB/Streymur (1/0), 6. Høgni MADSEN, ÍF (2/0),7. Bárður OLSEN, EB/Streymur (2/0), 18. Leif NICLASEN, EB/Streymur (1/0)
**Venjari:** Jógvan Martin OLSEN
**Hjálparvenjari:** Jens Martin KNUDSEN
**Lækni:** Kaj KALLSBERG
**Fystioterapeutar:** Álvur HANSEN og Øssur STEINHÓLM
**Liðleiðarar:** Birgir HANSEN og Bárður Lava OLSEN

**Rumenia:** 1. Bogdan LOBONT, Dynamo Bucharest – Cosmin CONTRA, Getafe, liðf., 6. Mirel RADOI, Steua Bucharest (14. Sorin GHIONEA, FC Bucharest, 18.), 15. Dorin GOIAN, Steua Bucharest, 5. Mihai NESU (FC Utrecht) – 16. Costin LAZAR, Rapid Bucharest, 8. Paul CODREA, Siena, 10. Marian ALIUTA, Sporting Club Vaslui (17. Cosmin MOTI, Dinamo Bucharest, 68.) – 11. Razvan COCIS, Lokomotiv Moskva, 18. Marius NICULAE, Dinamo Bucharest (9. Florin BRATU, 89.), 7. Florin COSTEA, Universitatea Craiova
**Gult kort:** Florin COSTEA, 73.
**Reytt kort:** Sorin GHIONEA, 49.
**Á beinkinum uttan at koma inn:** 12. Edouard STANCIOIU, 1907 Cluj, 13. Christian SAPINARU, FC Porto, 3, Stefan RADU, Lazio, 4. Micozaz SICA
**Venjari:** Victor PITRURCA